Tórshavn, 10.12.2018

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

Arbeiðsbólkurin at viðgera og eftirmeta skipanina í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi hevur fingið til ummælis uppskot landsstýrismanins um broytingar í fyrisitingini av fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi í 2019.

Uppskotið er viðgjørt á fundi 10.12.2018, har niðurstøðurnar vóru hesar:

*Til 1.*
Arbeiðsbólkurin tekur undir við, at arbeiðið í bólkinum heldur fram, og at arbeiðsetningurin verður nærri greinaður

*Til 2.*
Vinnuumboðini í arbeiðsbólkinum taka undir við, at fiskidagaskipanin heldur fram í 2019.

*Til 3.*
a) Arbeiðsbólkurin tekur í prinsippinum undir við, at leiðir verða friðaðar fyri at verja smáfiskin. Vinnuumboðini mæla tó til, at spurningurin verður viðgjørdur nærri, áðrenn ítøkilig stig vera tikin, og at hetta verður gjørt saman við spurningum um friðingar í føroyskum sjógvi yvirhøvur.

b) Arbeiðsbólkurnin tekur undir við, at fleiri fiskiveiðiroyndir verða gjørdar á Føroya Banka í 2019 í samstarvi millum Havstovuna og vinnuna.

c) Vinnuumboðini í bólkinum taka ikki undir við, at fiskidagarnir í 2019 verða skerdir við 10 prosentum, ella at fiskidagar yvirhøvur verða skerdir í 2019. Vinnuumboðini halda, at spurningurin um at stilla fiskidagatalið eigur at verða viðgjørdur í síni heild, tá bólkurin seinni fer undir at viðgera umsitingarætlanir o.a. í sambandi við at skipa fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi

d) Vinnuumboðini í bólkinum taka undir við, at reglurnar um avhending av fiskidøgum verða broytta, so at fiskidagar í størri mun enn nú kunnu avhendast teimum, ið hava tørv á fiskidøgum.

vegna arbeiðsbólkin

Jens Helgi Toftum, samskipari

+ hjáløgd eru skrivlig svar frá Føroya Reiðarafelag, Felagnum Trolbátar, Føroya Skipara- og Navigatørfelagnum, Maskinmeistarafelagnum og Føroya Fiskimannafelag